# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

## Nýtt gólv á Hálsi

Tá talan er um altjóða karmar til hondbólt, eru Føroyar ikki veruliga komnar á kravda støðið. Ein broyting í hesum er tó, tá landsdysturin í kvøld verður spældur. Í samstarvi við Tórshavnar Kommunu hevur nevnliga eydnast HSF at fáa nýtt gólv til høllina á Hálsi. Talan er um gólv, sum einvíst er merkt til hondbóltsdystir, og har aðrar strikur tí ikki eru á gólvinum.

**-mørk**

## Dia verður eygleiddur

Tá hondbóltslandsliðið spælir móti Serbia, hevur landsliðsvenjarin tvey eyka eygu vend móti sínum avriki.

Dia er nevnliga í ferð við at taka donsku Master Coach-venjaraútbúgvingina, og í hesum sambandi er Ole Eliasen nú í Føroyum og fylgir Dia.

Ole Eliasen er eitt av heilt stóru hondbóltsvenjaranøvnunum í Danmark. Hann hevur staðið fyri fleiri útgávum um hondbóltsvenjing, og er eisini ein av føstu eksaminatorunum og ráðgevunum hjá Danska Hondbóltssambandinum. Eisini virkar hann sum ráðgevi hjá eysturríkska hondbóltssambandinum innan teirra venjaraútbúgvingar.

**-mørk**

## Formuladeildin bíðar

Fótbóltssambandið hevur framvegis ikki tikið avgerð, hvussu tað verður við teimum trimum dystunum í Formuladeildini, sum leygardagin vórðu avlýstir orsaka av veðri.

Sveinur Tróndarsson, formaður í kappingarnevndini hjá FSF, sigur, at avgerðin um dystirnar er ikki tikin enn, men at hon verður tikin sum skjótast.

Dystirnir ÍF-B71, Víkingur-KÍ og EB/Streymur-HB vóru steðgaðir, tí veðrið var so vánaligt. Støðan í øllum dystunum var 0-0, og ein møguleiki er at døma allar dystirnar at enda 0-0. Annar møguleikin er, at dystirnir verða spældir, nær hetta so skal gerast.

**-mørk**

# Serbia bíðar í kvøld

**Serbisku spælararnir vóru seinkaðir av vána floglíkindunum, men teir eru til reiðar at takast við teir føroysku í kvøld**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Klokkan 19 í kvøld fer føroyska manslandsliðið í hondbólti aftur í altjóða eldin.

Talan er um fyrsta dystin í EM-undankappingini, sum nú verður skipað við veruligum bólkaspæli.

Umfram Serbia eru mótstøðuliðini hjá Føroyum Bosnia, Russland, Italia og Sveis. Júst Serbia var annars mótstøðulið hjá okkara monnum til seinastu undankapping, og í vár gjørdist talan um frálíka hondbóltsuppliving á Hálsi, tá Serbia vitjaði.

Tað endaði við, at Serbia vann dystin hampuliga trygt, men leingi høvdu okkara menn eitt sera gott tak á mótstøðuni, har spælararnir vóru ikki sørt frustreraðir um óvæntaðu mótstøðuna.

Hvussu leikur fer í kvøld, ber sjálvandi illa til at siga í skrivandi løtu, men útlitini eru tó enn eina ferð fyri eini góðari hondbóltsuppliving.



*Klokkan 19 í kvøld verður høllin á Hálsi karmur um hondbóltslandsdyst millum Føroyar og Serbia*

# Sylla bíðar framvegis

**Hóast FC Amager fleiri ferðir hevur fingið at vita, at arbeiðs- og uppihaldsloyvið hjá Sylla er mest sum avgreitt, hevur fyrrverandi ÍF- og B36-spælarin enn bert vant við nýggja felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var longu í summar, at FC Amager gjørdi sáttmála við ivorianska áleyparan, sum í vár spældi við maltesiska Birkirkara, eftir at hann áður hevur verið toppskjútti hjá bæði ÍF og B36.

Men enn verður bíða eftir spæliloyvinum, sum er seinkað, tí danska útlendingastýrið ikki hevur avgreitt umsóknina mum arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

- Hetta er frustrerandi fyri bæði okkum og Sylla. Vit kenna ikki so heilt nógv til hansara evni, og vit hava gjørt ein seks mánað sáttmála, so hann kann prógva, at hann er rætti maðurin hjá okkum. Vit hava fleiri ferðir fingið at vita, at pappírini so at siga eru avgreidd, men kortini koma tey ikki vegin fram. Eitt nú var ætlanin, at Sylla skuldi vera partur av hópinum móti Skive seinast, men tað varð so eisini av ongum, sigur Julian Hansen, sum er hjálparvenjari hjá FC Amager, við heimasíðuna hjá felagnum.

Og eisini ítróttarliga er spenningurin um Sylla hampuliga stórur í FC Amager. Higar til hevur Anders Jochumsen verið stóri málslúkurin á liðnum, men í longdini er tað ikki haldbært, at ein maður einsamallur stendur fyri helminginum av málunum hjá liðnum. Og tí verður vónað, at Sylla kann vísa nakað av máltevinum, sum hann áður hevur víst í Føroyum og á Malta.



*Síðani í summar hevur Sylla vant við FC Amager, men nú fýra umfør eru eftir av heystinum, hevur hann enn fyrsta dystin fyri felagið til góðar*
*Mynd: www.fca.dk*